

lótu úr hondum, hevur framleiðarin hjá The Beatles, George Martin, kallað besta tónleikin av øllum tónleiki, sum varð gjørdur í 60'unum. Tá eftirtíðin fer at leita eftir nýskapandi tónleiki úr farnu øld, fara nøvnini Lennon og McCartney tí at hava somu støðu, sum navnið Mozart hevði í síni tíð.

## Persónmenskan Lennon

Var John Lennon ein stórur sangari og sangskrivari, so var hann eisini ein sjáldsom og ofta mótsigandi persónmenska. Í The Beatles var hann tann intellektuella og ótolna kraftin. Rebellurin, sum pínadoyð ikki tímdi at geva seg undir mjørkatos hjá følskum myndugleikum, og sum tí alt sítt lív boksaðist við øll sløg av valdsharrum. Sjálvt Richard Nixon ræddist John Lennon og fekk fólk at elta hann fyrst í 70'unum, meðan Vietnam-kríggið gjørdist ein alsamt størri kleppur um beinini á amerikonsku stjórnini. Onki var at siga til hetta, tí frammanundan hevði amerikanski forsetin hoyrt eina millión mótmælisfólk syngja "Give Peace A Chance" uttan fyri Hvítu Húsini.

John Lennon er sjálvandi best kendur fyri sín tónleik, men dyrkar tú persónin, er minst líka stuttligt at lurta eftir samrøðunum við hann. Skjótt verður greitt, at hann var nógv meira enn ein vanligur rockari og poppari. Hann var skarpur í sínum útsagnum og metingum. Segði tað, hann hugsaði, og varð ofta hartaður fyri at siga teir sannleikar, ið ongin annar tordi at bera fram. Tá Beatles var í hæddini í 1966, suffaði hann tungliga um alt hóvastákið og hugleiddi um, at Beatles var vorðið betri umtókt enn Jesus. Javel, søgdu onglendingar, men skandalan var vís í bíbliubeltinum í USA, sum fór at brenna Beatles-plátur sum mótmæli ímóti John Lennon.

Lennon segði sjálvur, at tá hann var barn, ivaðist hann í, um hann var flogvit ella óður í høvdinum, tí ongin skilti hann. Hann hevði ikki sama kontrolleraða og ovurfegna sinnalagið sum Paul McCartney. Hetta sást í sangum sum "Strawberry Fields Forever," "I'm The Walrus," "Lucy In The Sky With Diamonds," "A Day In The Life" og "Come Together." Sangir sum hesir kollveltu rocktónleikin, og allir bólkar, ið komu aftaná, eitt nú Pink Floyd og Queen, lurtaðu, lærdu og førdu hesa nýskapan víðari. Tekstirnir hjá Lennon eru ofta, men langt frá altíð, surrealistiskir. Teir eru dragandi, og áðrenn tú veitst av, ert tú endaður í tí sermerkta og bersøgna Lennon-heiminum.

## Tann bersøgna røddin

Og latið okkum dvølja eitt sindur við tann bersøgna Lennon. Um síni politisku sjónarmið segði hann í 1971:

"Eg havi altíð verið politiskt tilvitaður og verið ímóti stillstøðu. Tað er grundleggjandi, tá tú veksur upp sum eg, at hata løgregluna sum ein natúrligan fígginda og skíggja herin sum nakað, ið tekur fólk við sær og letur tey liggja eftir onkustaðni steindeyð. Hetta var grundleggjandi kenslan í byrjanini, men sjálvandi fjarar kenslan eitt sindur av, tá tú verður eldri, fært familju og hvørvur inn í systemið. Eg havi speirikið systemið, síðan eg var barn, men onki er broytt. Vit eru eitt sindur betur ílatin nú, men somu idiotarnir ráða framvegis fyri borgum."

Eisini hevði hann í 1971 greiðar meiningar um, hví listafólk skuldu skapa vón millum tey ungu:

"Lívsstílurin í 20. øld er skaptur í Amerika. Ungfólk eru apatisk. Tey halda, at onki er vert at stríðast fyri, og at alt er liðugt. Tey vilja tí flýggja inn í rúsevnini og oyðileggja seg sjálvi. Okkara uppgáva er at siga teimum, at vón er fyri framman, og at nógv er eftir at gera. Vit mugu broyta teirra høvd og siga teimum, at tað er í lagi. Tingini kunnu broytast, og bara tí ungdómsuppreisturin ikki riggaði, ber ikki til at siga, at alt er liðugt. Hetta er bara byrjanin. Kollveltingin er akkurát byrjað. Hetta er byrjanin til tær stóru broytingarnar."

Um tær brendu Beatles-pláturnar í USA segði hann:

"Tá tey fóru at brenna pláturnar, var tað ein skelkur, men eg kundi ikki sleppa mær burtur og vita, at eg hevði skapt eitt lítið petti av hatri í heiminum. Men hatta er trupulleikin við at siga sannleikan. Tú vilt so fegin siga sannleikan, men mást vera falskur viðhvørt, tí alt tað heila er á ein hátt falskt, sum í einum spæli. Tú vónar, at um tú ert sannur viðhvørt, so fara fólk at virðsmeta teg og vera sonn afturímóti, tú vónar, at tað loysir seg. Men øll spæla spælið, og viðhvørt standi eg nakin og sannur eftir, meðan øll hvessa at mær. Tað er skuffandi."

## Um hann gjørdist 70

Spurningurin er so, hvat John Lennon hevði havt avrikað seinastu 30 árini, um hann var á lívi. Tá hann doyði, ætlaði hann at geva nógvar plátur út aftrat, og avlopið av "Double Fantasy" kom eisini út á "Milk And Honey" í 1984. Men hvussu hevði tónleikur hansara flutt seg í 80'unum og 90'unum? Hvat hevði hann brúkt internetið til, sum hann ongantíð upplivdi, og har fólk á YouTube framvegis harmast deyða hansara hvønn dag? Hvussu ofta hevði hann gjørt gjøldur burtur úr George Bush, og hvat hevði hann sagt um álopið á World Trade Center og fíggjarkreppuna? Ongin veit, og ongin veit heldur, um hann og Paul McCartney høvdu funnið saman aftur, men tað er lítið sannlíkt, tí at fara aftur til Beatles var sum at fara aftur í fortíðina, segði Lennon. Tað tímdi hann ikki.

Fjepparar kring heimin mugu tí dvølja við arvin. Syngja "Imagine," "Woman" og "Jelous Guy," meðan teir heiðra falnu kempuna. Eftirtíðin er langt síðan farin at falla dóm yvir John Lennon. Í eini kanning millum bretar varð hann útnevndur til 4. størstu persónmenskuna í bretsku søguni. Í somu kanning gjørdist Winston Churchill nr. 1. Kanska skalt tú vera farin av foldum fyri at fáa tílíka viðurkenning, men kortini sigur hetta ikki so lítið um tað pláss, ið John Lennon vann sær í søguni. Ein ótryggur drongur, ið búðu hjá mostir síni meginpartin av lívinum, tí pápin rýmdi, og mamman var nakað útsveimandi og seinni doyði, hevði ein dreym um at gerast líka stórur sum Elvis, og hann gjørdist ríkiliga tað.